# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Uttan mun til hvør fer at hava ábyrgdina, so havi eg eina greiða fatan av, at KÍ hevur potentiali at spæla upp ímóti øllum*

*Trýgvi Mortensen, fyribils settur KÍ-venjari*

# Drogba fekk seinasta orðið

**Við einum einsamøllum máli frá Didier Drogba eftir 116 minuttum fekk Chelsea hóast alt ein góðan enda upp á eitt kappingarár, har hvørki Champions ella Premiera League-steyp kom til høldar**



*Endiliga bestur. Didier Drogba gjørdist hetjan, tá hann í nýggja Wembley skeyt einasta málið í FA-Cup finaluni móti Manchester United*

*Mynd: Polfoto/AP*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Cristiano Ronaldo hevur í ár verið skutin framman fyri Didier Drogban. Ronaldo var fram um nakran høvuðsmaðurin í meistaraheitinum, sum Manchester United hesa ferð vann framman fyri Chelsea, og í bæði millum spælarar og fjølmiðlar vann Ronaldo heitið sum ársins framman fyri júst Drogba.

Leygardagin slapp ivorianski framherjin hjá Chelsea tó at svara aftur. Talan var ikki um nakran framúrskarandi fótbóltsdyst, tá Chelsea og Manchester United spældu finaludyst í FA-Cup. Til tess vóru taktisku snaringarnar ov tættar.

Spælarar, venjarar og áskoðarar vóru so smátt farin at fyrireika seg til brotsspørk, men við fýra minuttum eftir av longdu leiktíðini megnaði Drogba at seta hol. Við góðum 1-2 samanspæli við Kalou vann Drogba seg hálvan metur inn um Rio Ferdinand, og so fekk hann vippað upp um Van der Saar, sum royndi at koma út ímóti.

Soleiðis eydnaðist ikki hjá Sir Alex Ferguson at vinna sína fjórðu greipu, eins og Ryan Giggs heldur ikki hesa ferð kundi skrivað seg í søgubøkurnar sum einasti spælarin við fimm FA-Cup heitum.

**Vóru fyrireikaðir**

Ikki minst mundi sigurin kennast søtur hjá Chelsea-venjaranum, Jose Mourinho, sum fleiri ferðir hevur fingið at vita, at milliard-dýra liðið hjá honum ikki hevur livað upp til vónirnar hetta kappingarárið.

– Tað kann væl vera, at fólk halda, at United sat á dystinum, men eg eri ikki samdur. Teimum dámar at vinna við kvikum kontraálopum, og tí máttu vit fyrst og fremst forða fyri, at teir fingu nakað av slagnum. Hartil royndu vit støðugt at hava seks mans aftan fyri bóltin, so teir ikki fingu rúm til mótálopini, og í triðja lagi royndu vit at hava tveir mans á teirra kantum, tá hetta læt seg gera, segði Mourinho um taktikkin, ið altso eydnaðist til fulnar.

## Jón Rói spældi branddyst

Góð tíðindi eru at frætta undan landsdystinum ímóti heimsmeistarunum úr Italia fyrst í komandi mánaða. Jón Rói Jacobsen, sum áður hevur verið fastur maður í verjupartinum á landsliðnum, tykist av álvara at vera komin í gongd aftur eftir drúgva skaðasteðgin. Hann leikti allan dystin á høgra bakki fyri besta liðið hjá AaB, tá ið teir í um vikuskiftið vunnu 2-0 á Esbjerg. Heimasíðan hjá felagnum hevur bert rósandi orð til Jón Róa.



– Serliga var tað ein stórspælandi Jón Rói Jacobsen á høgra bakki, ið var eyðsýndur. Avgjørt besta avrikið hjá føroyinginum í AaB-troyggjuni higartil, skrivar heimasíðan hjá AaB.

Vónandi vinnur góða avrikið hjá havnarmanninum frama hjá venjaranum, sum hevði sett hann á høgra bakk ístaðin fyri Allan Olesen, sum ikki telist sum ein heilt fastur maður á liðnum.

AaB er við í stríðnum um heiðursmerki í superliguni.

